


**Nr. 13** *21. juni 2026* **86. árg.**

# Bíblian

Corrie ten Boom skrivar um Bíbliuna: „Á øllum mínum ferðum, eisini nú, tá ið eg eri yvir 80 ár, havi eg Bíbliuna við mær – í hondini og í hjartanum. Hon er lívsins orð og so **kjokkfull av góðum tíðindum.** Og í henni hevur altíð verið nóg mikið fyri ein og hvønn. Ofta kenni eg tað soleiðis, sum lærusveinarnir munnu hava kent tað, tá ið teir mettaðu meir enn fimm túsund við fimm breyðum og tveimum smáfiskum. Loyndarmálið var, at teir høvdu tikið ímóti tí úr Meistarans signaðu hondum. Har var nóg mikið til øll, ja, enntá tólv fullar kurvar av restum.

Tá ið eg var í New Zealandi, búði eg hjá einum húski, sum lærdi seg bíbilorð uttanat eftir „Navigatør-systemet“. Tá gjørdi eg av, at eg eisini skuldi fara at terpa skriftstøð. Eg visti, at tá ið Guds orð fyrst var goymt í hjarta mínum, so hevði eg tað har fyri tíðir og ævir.

Einaferð, tá ið eg skuldi inn í Eystur-Berlin, kom ein offiserur at kanna meg.

„Lesa tygum viðhvørt í Bíbliuni?“ spurdi eg offiserin.

„Nei, eg eri marxistur!“ svaraði hann treiskur.

„Bíblian varð skrivað serliga til marxistar,“ segði eg. „Hon sigur, at Gud elskaði marxistarnar so høgt, at hann gav son sín, hin einborna, fyri at ein og hvør marxistur, sum trýr á hann, ikki skal doyggja, men hava ævigt lív.“

Ja, mannaættin hevur tvey stór vandamál at dragast við: synd og deyða; men Bíblian gevur okkum svar upp á hesi vandamálini við at siga okkum frá Jesusi.

Mong menniskju gera tað mistakið, at tey halda, at tey kunnu máta sína frelsuvissu við sínum egnu kenslum. Men tað

er Guds orð, sum er grundarlagið. Tí er týdningarmikið fyri hin nýumvenda at hava praktiskan kunnleika til Bíbliuna. Hin nýumvendi er eisini meir enn nakar annar í skotlinju fíggindans. Tí treingir hann til Andans svørð, so hann kann verja seg móti øllum álopum."

*Effie Campbell* umsetti.

# Verksmiðjulúðurin ýldi ov tíðliga!

Guds ríki gongur fram í Kina! Evangeliið nær hjørtuni, og Orðið verður staðfest við teknum og kraftargerðum – sum á Bíbliunnar døgum! Tað er David Wang – aðalskrivari hjá Asian Outreach, sum gevur hesa frágreiðing:

Ein ung kristin kvinna arbeiddi á skrivstovuni í einum grótbroti. Ein av hennara vanligu skyldum var at trýsta á lúðurin, tá ið arbeiðsdagurin var liðugur. Men ein dagin hendi nakað heilt annað.

Hon var sum vanligt upptikin av arbeiði sínum inni á skrivstovuni – tá ið hon brádliga hoyrdi eina rødd, sum tosaði við seg og nevndi hana við navni. Røddin bað hana **ALT FYRI EITT SETA LÚÐURIN Í GONGD**, hóast ein tími var eftir av arbeiðstíðini. Hon bleiv illa við og visti hvørki út ella inn. Men tá ið hon skilti, at hetta var Harrin, tók hon sína avgerð. Uttan at samráðast við onnur á skrivstovuni – sum lættliga høvdu kunnað forðað henni – setti hon lúðurin í gongd.

Arbeiðsmenninir byrjaðu nú at koma út úr náminum. Hin seinasti var júst komin út, tá ið ein jarðskjálvti risti staðið. Fleiri av arbeiðsholunum fullu saman og vórðu jarðaðar undir grótrúgvum. Um arbeiðsmenninir enn høvdu verið har, hevði vanlukkan kraft nógv mannalív …

Vit kunnu bara ímynda okkum vanlukkustandin á økinum. Arbeiðsmenninir savnaðust runt gentuna og vildu vita, hví hon hevði trýst á lúðurin, áðrenn tíðin var komin. Hon mátti tá bara játta, at hon var kristin, og at hon hevði verið Guds rødd lýðin! Frágreiðing hennara var heilt einføld, men tað, sum hon segði, gjørdist ein sterkur boðskapur fyri henda stóra skaran. Fleiri hundrað blivu umvend tann dagin – og Evangeliið fekk stóra framgongd.

Í einari almennari kanning, sum bleiv gjørd seinni – skrivaðu teir eisini vitnisburðin hjá gentuni niður í frágreiðingina – og aftur blivu fólk vakt upp. Hin livandi og sanni Gud hevði á ein

ítøkiligan máta brúkt ein trúgvandi ungdóm til bjargingar og frelsu, og aftur gjørdist úrslitið, at mong menniskju og heilar familjur blivu kristin!

*„Christian Life“ – Effie Campbell* umsetti.

# Í lyftuni saman við einum skrøppum ótanga

Hetta hendi í einum øki í Onglandi, har fleiri kolanám vóru. Ein av arbeiðsmonnunum skuldi fylgja einum umsjónarmanni niður í eina av teimum djúpastu gongdunum fyri at vegleiða hann og svara nøkrum spurningum.

Arbeiðsmaðurin skilti skjótt, at hin var ein grovur og ónærisligur maður við einum skitnum munni. Hann spottaði, bannaði, og illbønir flutu frá honum.

Arbeiðsmaðurin har afturímóti var trúgvandi maður – og meira spakførur og gjørdi einki um seg.

Tá ið hesir báðir stóðu í lyftuni á veg niður í dýpið, vuksu hitastigini brádliga nógv. Umsjónarmaðurin turkaði sveittan av andlitinum, meðan hann slongdi fleiri ókvæmisorð úr sær. Og við tað at teir støðugt komu djúpari niður – og hitin vaks – bleiv atburðurin hjá honum meira ágangandi. At enda rann mest sum yvir hjá honum – og blótandi og bannandi stardi hann upp á tann trúgvandi mannin og segði: „Eg hugsi um, hvussu langt man vera til helvitið!“

Hesin stillføri, trúgvandi maðurin svaraði honum: „Eg veit ikki vist, men um veirurin skuldi brostið, hevði tú verið har um einar tveir minuttir…“

**SKRIFTIN** sigur: „Frekir og sjálvgóðir sum teir eru, firnast teir ikki fyri at spotta dýrdarmáttir.“ (2. Pæt. 2,10). Lesið allan kapittulin.

Jesus kom fyri at geva **LÍV** – ja, lív í yvirflóð!!! (Jóh. 10,10). – Hvør er tað, sum stjelur, drepur og oyðir? (Jóh. 10,10).

*TF – Effie Campbell* umsetti.

Hugsa **longri**!
Hugsa **hægri**!
Hugsa **størri**!
Hugsa **ævigt**!
Hugsa **JESUS**!

*e.c.* ums.

# Svarið er, at vera eyðmjúkur, lítillátin

Ein vísmaður leitaði upp ein rabbi. „Hvussu ber tað til, at Gud opinberaði seg fyri fólki fyrr í tíðini, men nú á døgum hoyra vit einki til slíkt?“ spurdi vísmaðurin.

„Tað er tí, at fólk boyggja seg ikki nóg langt niður, so tey kunnu hoyra Hann tala. Tey eru stívrend, sjálvklók, hástór og erpin. Tey eru einki petti eyðmjúk og lítillátin.“

Svarið finna vit í Mika 6,8: „Hann hevur opinberað tær, menniskja, hvat gott er! Hvat annað krevur Harrin av tær, enn at tú skalt gera rætt, fegin vísa kærleika og liva eyðmjúkt við Gudi tínum!“ (V.D.)

*Effie Campbell* umsetti.

# Ein rein og trúføst brúður

Ein maður skuldi undirvísa á einum ungdómsmøti um trúloving, kynslívið og hjúnalagið. Hann skuldi siga teimum ungu, hvat ið Bíblian sigur um eitt evni, sum fær so nógv rúm í samfelagnum og miðlunum.

Hann brúkti tvær sodavatnsfløskur sum dømi. Hann læt aðra fløskuna upp og tók ein slurk av henni og sendi hana víðari til ein av ungdómunum á fremsta rað og bað hann gera tað sama.

Tá ið sodavatnsfløskan hevði vitjað okkurt um 10 ymiskar munnar, var tað at enda ein genta, sum segði nei takk.

Tá ið maðurin tók fløskuna aftur, var bara ein fimtipartur av sodavatninum eftir. Hann spurdi, hvør fløska var hin mest eiggiliga og dragandi, tann fulla, óupplatna fløskan, ella hin, sum hevði verið runt hjá fleiri. Svarið gav seg sjálvt.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Um tú vilt sleppa undan atfinningum – sig einki, ger einki, ver einki. Hasa felluna má ein trúgvandi ongantíð detta í! Men vit skulu vera merkt av: ***víðskygni, framskygni og umhugsni.***

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74




**Nr. 14** ***5. juli 2026*** **86. árg.**

# Kallið

*„Spyr tó fyrst, hvat Harrin sigur.“*
*1. Kong. 22,5 & 2. Krøn. 18,4*

Ja, tað er av alstórum týdningi, at vit spyrja Harran, hvat ið vit skulu velja í øllum lívsins viðurskiftum. Tí Hann veit best. Hann hevur lagt ymisk evni niður í okkum, og skulu tey koma til sín fulla rætt, mugu vit velja beint. Tað umfatar allar støður í lívinum: útbúgving, hjúnafelaga, bústað o.s.fr.

Fyri árum síðani, tá ið vit øll keyptu og lurtaðu eftir kassettubondum, keypti eg fýra bond, har norðmaðurin Einar Lundby talaði. Hesin maður var lækni, men hann man vera best kendur sum prædikumaður. Hann var høgt í metum sum ein Harrans boðberi og sálarhirði. Hansara boðskapur var ikki tóm orð, men eitt lív í nærsamband við tann Harra, sum hann livdi fyri og tænti.

Í einari talu síni nevndi hann nakað, sum eg ongantíð havi kunnað gloymt. Hann greiddi frá, at hann, sum tá var ein unglingi, hevði verið á einari legu. Nógvir unglingar góvu tá Jesusi lív sítt og vildu brúka tað í Hansara tænastu. Fleiri ætlaðu sær út í heidningalond at bera hin glaða boðskapin.

Í tokinum á veg heim aftur sat hann og bað. Hann hevði eisini ætlað sær út, har Jesus ikki var kendur, men hann visti ikki rættiliga hvar. So bað hann til Harran og segði: „Harri, sig mær, hvar skal eg fara fyri teg? Nú lati eg Bíbliu mína upp og peiki á okkurt skriftstað, lat tað so vera títt svar til mín.“

So læt hann eyguni upp og sá, at hann var komin niður á Ezekiel 3,5–6. Høvuðsinnihaldið í hesum báðum versum er: „… tú verður ikki sendur til fólkasløg, ið hava torskilt mál,

sum tú ikki skilir. Sanniliga, Eg sendi teg til teirra, sum vilja lurta eftir tær, til Ísraels hús.“

So hevði hann fingið greið boð um, at hann skuldi virka í egna landi sínum og ikki teirra millum, sum høvdu eitt fremmant mál.

*Effie Campbell.*

# Hvør hevur skapt Gud?

Eg var um 10 ára aldur. Omma, abbi og eg vóru einsamøll í køkinum. So sigi eg við ommu: „Omma, hvør hevur skapt alt?“

„Tað hevur Gud,“ svarar hon.

„Ja, men hvør hevur so skapt Gud?“

„Tað hevur eingin. Hann hevur altíð verið til.“

„Tað skilji eg ikki. Poppar Hann so brádliga upp mitt í øllum, heilt av sær sjálvum?“

Tað dugdi hon ikki rættiliga at svara uppá. Men so gingu nøkur ár, og eg fór í realskúla. Har lærdu vit um mannakroppin og fingu at vita, at mannaheilin var til støddar sum ein knýttur mansnevni. Tá fall alt upp á pláss hjá mær. Nú var eg brádliga so glað um, at eg ikki skilti, hvussu Gud var komin. Tí skrivað stendur, at Gud er so stórur, at himlanna himlar kunnu ikki rúma honum. Enn minni passar mín stóri Gud inn í mín lítla heila.

Eg eri so glað, at Hann er so stórur, at eg ikki skilji alt, tí skilti eg alt, so var Hann jú á sama støði sum vit menniskju. Gott, at Hann er so langt oman fyri okkum, at vit smáu menniskju bara kunnu hvíla trygt í hansara hondum. Tí Hann gevur okkum altíð tað besta, ongantíð tað næstbest.

*Effie Campbell.*

# Biður tú fyri onkrum, sum ikki er frelstur?

*„… hann er langmóðigur við tykkum, av tí at hann ikki vil, at nakar skal glatast…“ 2. Pæt. 3,9.*

Um tú biður fyri einum nærskyldum persóni, sum ikki er frelstur, so fært tú her eitt bíbilskt lyfti, sum tú kanst standa á í dag: „ … hann er langmóðigur við tykkum, av tí at hann ikki vil, at nakar skal glatast, men at øll skulu koma til umvendingar.“

Strika orðið „tykkum“ og set navnið á tínum skyldfólki staðin fyri. So leingi, sum lív er, er vón! Síðsta undurverkið,

Jesus gjørdi, var at frelsa ein brotsmann, sum hekk á einum krossi undir liðini á honum: „Í dag skalt tú vera við mær í páradís!“ Luk. 23,43.

Skaldið, Annie Johnson Flint, orðar tað so:

*Guds náði er botnleys,*
*ómáldur hans friður.*
*Og aldri hans megi*
*kann svinna avstað.*
*Og av sínum veldigu*
*ævigu skattum*
*Hann gevur og gevur*
*og gevur hvønn dag.*

Uttan mun til hvussu „langt úti“ tíni kæru kanska eru, kann Guds náði og miskunnsemi enn røkka teimum – so halt á at biðja fyri teimum. Hoyr: „Hond Harrans er ikki ov stutt til at frelsa, oyra hans ikki so deyvt, at tað ikki hoyrir.“ Jes. 59,1.

Jesus segði: „Eingin kann koma til mín, uttan faðirin, sum sendi meg, dregur hann.“ Jóhs. 6,44. Bið tí Gud senda onkran til tíni kæru, sum vil vísa teimum, hvussu tú verður frelstur. Fram um alt mást tú ikki falla í fátt og byrja at ivast. Minst til, at tað er Guds vilji at frelsa tey, og tá ið tú veitst, at tú biður í samsvari við vilja hansara, kanst tú nærkast honum við frímóði. „Og hetta er tað treystið, sum vit hava til hansara, at um vit biðja um okkurt eftir vilja hansara, tá hoyrir hann okkum. Og um vit vita, at hann hoyrir okkum, hvat vit so biðja um, tá vita vit, at okkum eru veittar tær bønir, sum vit hava biðið hann um.“ 1. Jóh. 15,14–15.

*„… et Ord til Dagen“ – Effie Campbell* umsetti.

# Troyst úr himli

Ein maður talaði í Meinigheitshúsinum. Upp í talu sína knýtti hann eina frásøgn um sorg og vón til teirra, har deyðin hevur vitjað:

Ein kona í Onglandi átti ein son. Tá ið drongurin var 4 ár, doyði hann av krabba. Mamman syrgdi ómetaligt, alt tyktist so tómt, einsligt og høpisleyst. So gingu trý ár, og 1. apríl setti hon seg í bilin og koyrdi út á kirkjugarðin. Henda dagin hevði sonur hennara fylt 7 ár, um hann hevði verið á lívi. Hon græt og rópti hart í bilinum: „Vís mammu eitt tekin!“

Komin út á kirkjugarðin, setti hon seg á kantin á grøvini. Tá hendi nakað. Ein smáfuglur, ein bringureyði tey kalla, setti seg á gravsteinin. So fleyg hann yvir og setti seg á fremstafingur á mammuni. Har sat hann eina góða løtu og hugdi beint inn í eyguni á mammuni. Síðani setti hann seg á øksl hennara og pikkaði spakuliga tvær ferðir niður á øksl hennara, og so fleyg hann avstað aftur.

Mamman fór á føtur og var uggað, nú hon koyrdi til hús aftur.

*Effie Campbell.*

# Elskaður av Gudi

Hevur tú givið tær far um, at Sakeus ikki fekk boð um at fáa sær annað starv? Men Jesus vissaði hann um, at hann var elskaður og góðtikin út í odd og egg sum eftirkomari Ábrahams t.v.s. eitt Guds barn (Luk. 19,9–10). Ein jødi kundi ikki fáa eina størri viðurkenning. Nú kundi Sakeus uppliva Guds signing, har hann var, og í tí arbeiði, hann hevði, uttan mun til um onnur høvdu ringt eyga á honum ella ikki.

*Effie Campbell* umsetti.

# Jesus – Guds offurlamb

Einaferð var eingin synd, óndskapur, einki hatur, kríggj og ongar sjúkur á jørð. Alt var friður og semja. Men ein dag smeyg slangan – hin óndi djevulin – sær inn í Edens urtagarð. Tá vendi menniskjuni sær burtur frá Gudi og fylgdu djevlinum, tá kom synd, sorg, sjúka og hatur inn í verðina. Men Gud elskaði verðina og vildi frelsa og gera bót fyri menniskjuni, sum høvdu syndað. Tá sendi hann Jesus, sum gjørdist Guds offurlamb. Gud sendi ikki eina bók, eina religión, eitt ritual, tá ið hann skuldi frelsa verðina. Hann sendi ein mann – ein persón, Jesus, Guds son, sum gjørdist okkara staðgongumaður og tók á seg allar okkara syndir, sjúkur og revsing – so at vit sleppa undan. Av tí at hann tók okkara syndir, kunnu vit verða frelst. Av tí at hann bar sjúkur okkara, kunnu vit verða grødd.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Jesus er vegurin, sannleikin og lívið. *e.c.* ums.

---

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74